Nósavitjan

Nósi hevur føðingardag frá 17. til 21. september.
Nósi kemur í allar deildir hjá Føroya Banka at heilsa uppá børnini ið koma í føðingardag.
Tømir tú tín Nósa, ja so fært tú eisini eina føðingardagsgávu.



Nósi vitjar á deildunum hesar dagar:

Eysturoy	Fuglafjørður	Mánadagin	17. sep. kl. 14.30 - 16.30
	Saltangará	Hósdagin	20. sep. kl. 10.30 - 11.00
	Toftir	Hósdagin	20. sep. kl. 14.30 - 16.30
	Saltangará	Hósdagin	20. sep. kl. 16.30 - 17.30
	Strendur	Fríggjadagin	21. sep. kl. 13.00 - 14.00
	Eiði	Fríggjadagin	21. sep. kl. 14.30 - 16.30
Vágar	Miðvágur	Hósdagin	20. sep. kl. 14.30 - 15.30
	Sandavágur	Hósdagin	20. sep. kl. 16.00 - 17.00
	Sørvágur	Fríggjadagin	21. sep. kl. 13.00 - 14.00
Sandoy	Skopun	Fríggjadagin	21. sep. kl. 14.00 - 14.30
	Sandur	Fríggjadagin	21. sep. kl. 15.00 - 15.30
Streymoy	Vestmanna	Mánadagin	17. sep. kl. 14.00 - 15.00
	N.Finsensgøta	Hósdagin	20. sep. kl. 10.30 - 11.30
	[illegible]	Hósdagin	20. sep. kl. 13.00 - 14.00
	SMS	Hósdagin	20. sep. kl. 14.30 - 15.30
	N.Finsensgøta	Hósdagin	20. sep. kl. 16.30 - 17.30

Minningarorð um okkara elskaða Paula Holmsund, Kambsdal

Syrgilig vóru tey boðini vit fingu tá tú so brádliga varð tikin frá okkum, bert 18 ára gamal.

Tað er so ringt at vita, at tú ikki er ímillum okkum meir, men øll tey góðu minnir, vit hava um teg góði Pauli, tey eru góð at eiga.

Frá fyrsta degi eg sá teg nýføddan, hvat var tú ikki fittur. So fluttu tit norðureftir at búgva. Omman var fleiri ferðir og ferðaðist hjá tykkum, og sum eg eri so glað fyri. So sendi mamma tín teg at ferðast til ommuna ofta, takk góða Leila fyri tað.

Góði Pauli, tað er eitt sár í hjartanum hjá okkum øllum, at tú so brádliga bleiv kallaður heim til Harran. Omman og vit øll lýsa frið um øll tey góðu minnini um teg elskaði.

Farvæl farvæl, men ikki ævugt nei
ein stokkut stund, eitt lítið tíðarskeið
har møtast vit, hvar skilnaður er ei
og inntil tá farvæl.

Omma tín í Froðba

Drupu springarar hÛast s˝slumaður segði nei

Jústinus Leivsson Eidesgaard

Um 11 tíðina í gjáramorgunin løgdu 30springarar beinini í Sandagerði í Havn. Bólkurin av springarum var funnin út fyri Hvítanesi.

Talan var um eitt ólógligt springaradráp hesuferð. Viðvíknandi springarum, so er tað soleiðis, at sýslumaðurin skal geva loyvi í hvørjum einstøkum føri og hesuferð segði hann nei. Men havnamenn vildu ikki hava á sær sitandi, at ein sýslumaður úr Vestmanna skuldi banna teimum at halda springarar til og teir løgdu sektin á boðini úr Vestmanna.

Tað eydnaðist okkum ikki at fáa eina viðmerking frá sýslumanninum í Vestmanna, Ivan Klein Olsen, áðrenn blaðið fór til prentingar.

Vanliga verða springarar býttir millum teir sum eru í drápinum og nakrar skipaðar reglur eru ikki fyri býtinum. Ttað vil siga, at tann sum sterkastur og frekastur er fær mest av hesum átliga tvøsti

Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu, tá okkara kæra dóttir, kona, mamma og vermamma

Jensina Elisabeth Simonsen

doyði og varð jarðað.

Tøkk til tykkum, ið sendu blómur og kransar
og tykkum mongu, ið fylgdu henni
til hennara síðsta hvíldarstað.
Tøkk til sangarar og berarar
og til tykkum, ið hjálptu til við jarðarferðina.

Ein serstøk tøkk til starvsfólkið
á B5 á Landssjúkrahúsinum,
Bjarna Bæk dómpróvst og Marit Holm Petersen.

Mo, Kim, Mariann, Beinta og Magnus

Vit skulu vara okkum fyri muslimum

ñ Tað er vandamikið at fara lÊttliga um muslimsku hÛttanina, og vit eiga Ì framtÌðini at vara okkum meira fyri muslimum. Men fer vesturheimurin at hevna seg og drepa fleiri Ûsek, so eru vit einki petti frÊgari enn tey, sum framdu ·lopini Ì USA, heldur Jenis av Rana, tingmaður

MUSLIMSK HÓTTAN

Eyðun Klakstein

Tey, sum framdu álopið í USA, skulu finnast, men fer vesturheimurin nú at hevna seg inn á ósek fólk, so eru vit einki petti frægari enn tey fólkini, sum framdu álopið í USA, sigur Jenis av Rana, tingmaður fyri Miðflokkin

Fyri einum ári síðani fekk hann ein amerikumann at taka mynd av sær og familju síni ovast á World Trade Center í New York.

Nú øtast um ræðuliga álopið á sama bygning, sum eftir øllum at døma hevur kravt fleiri túsund mannalív.

– Hetta er verri, enn tú nakrantíð hevði kunna ímyndað tær fór at henda. Tað er blint hatur, sum fær fólk at gera slíkt, og tað vísir, at vit eiga at taka muslimsku hóttanina í nógv størri álvara, enn vit hava gjørt.

Tað sigur Jenis av Rana, sum er tingmaður fyri Miðflokkin. Hann er eisini limur í uttanlandsnevndini hjá løgtinginum og hevur stóran áhuga fyri átrúnaðarligum viðurskiftum.

– Tað er vandamikið at fara lættliga um muslimsku hóttanina. Vit verða noydd at verja okkum og vera meira varin. Teirra hugsunarháttur og trúgv er so avskeplað, at tað er vandamikið fyri fría heimin, heldur hann.

– Tað sigur nógv um hesar fundamentalistar, at tú kanst fáa fólk at trúgva, at um tey renna eitt flogfar inn í ein bygning í USA, so sleppa tey beinleiðis í paradís.

Stórur munur á trúgv

Tingmaðurin fyri Miðflokkin heldur, at muslimska hóttanin alt ov leingi hevur verið bagatelliserað.

– Vit síggja børn og ungfólk steina í Miðeystri, men so verður bara sagt, at hatta hevur einki at týða, tí hatta hava ísraelsmenn uppiborið. Hinvegin var ein týskari tikin í Svøríki, tí hann hevði tveitt við gróti, tá ein aljóða fundur var har. Hann fekk eitt hálvt ár í fongsli.

– Hetta vísir, hvussu stórur munur er á samfeløgum, og hvussu ymiskur hugsanarhátturin og trúgvin er. Eg veit væl, at allir muslimar eru ikki eins, men teirra skriftir læra, at teir skulu drepa fyri sína trúgv. Tað er í stórari mótsøgn til kristnu trúnna, sum byggir á kærleika og fyrigeving, sigur Jenis av Rana.

Ósek mugu ikki líða

Jenis av Rana heldur, at tey, sum framdu og høvdu ábyrgdina av álopinum í USA, eiga at finnast og verða drigin til svars fyri sínar gerðir.

– Men fer vesturheimurin nú at hevna seg inn á ósek fólk, so eru vit einki petti frægari enn tey fólkini, sum framdu álopið í USA, sigur hann avgjørdur.

– Tað eigur at bera til hjá einum framkomnum hervaldi at finna tey seku, uttan at tað skal ganga út yvir ósek fólk í til dømis Afghanistan. Fólk har á leið líða nóg mikið sum er.

Jenis av Rana heldur tó, at føroyingar eiga at stuðla teimum, sum stríðast fyri fólkaræðinum.

– USA gongur við øllum sínum feilum og manglum á odda fyri fólkaræðinum, og tí skulu vit stuðla teimum. Víst er tað neyðugt, at vit verja okkum betri, og víst er tað neyðugt, at vit stríðast ímóti teimum, sum leypa á fólkaræðið, sigur Jenis av Rana.

Noomi Juul Ì SMS

Tíðindaskriv:

Mánadagin lat Gallarí Vágsbotn upp stóra søluframsýning á Torginum í SMS.

Fyrr í ár hevði Noomi Juul, sum eigur Gallarí Vágsbotn, søluframsýning í SMS, og hendan varð rættiliga væl vitjað. Hetta komst serliga av tí, at lutirnir, hon tá hevði, júst vóru komnir úr Danmørk. Hesaferð verður ikki nógv øðrvísi. Noomi sigur, at hon júst hevur verið í Danmørk og keypt inn til framsýningina í SMS.

– Eg fái eina rúgvu av lutum í gomlum sniði heim til framsýningina í SMS. Og eftirspurningurin eftir hesum lutum er støðugt hækkandi, sigur Noomi Juul, sum vónar, at mong koma at vitja søluframsýning hennara á Torginum.

Framsýningin hjá Gallarí Vágsbotn verður opin til leygardagin 22. septembur.

FÛlkadansur Ì HÛsvÌk

Savnsmynd

DANSUR

Turið Kjølbro

Í nøkur ár hevur verið dansað og undirvíst í dansi í Hósvík. Í vetur byrjar nýtt skeið í fólkadansi. Byrjað verður sunnukvøldið 30. september kl. 19.00 í Bygdarhúsinum. Tey, ið fara at stíla fyri dansinum í vetur, verða Matilda og Tom Nielsen. Hesi bæði hava undirvíst í fleiri ár og dansað í Dansifrøi.

– Øll eru vælkomin, roynd og óroynd, men fyri at fáa dansin at ganga sum hann skal, er skilabest, at tvey og tvey møta, sigur ein av stigtakarunum.

Fyri alt dansiskeiðið í vetur kostar tað 400 krónur fyri parið. Tilmeldingar á tlf. 422291 og 422425.